

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 03 - 2012

# Norra og Føroyar fyrimyndir hjá Hetlandi og Orknoyggjum

Hetland og Orknoyggjar vilja sjálvstýri heldur enn loysing, nú fólkaatkvøða skal vera um eitt sjálvstøðugt Skotland. Olja og gass Olja og gass hava ein týðandi leiklut, nú skotar einaferð í næstu framtíð skulu halda fólkaatkvøðu um at loysa frá Stórabretlandi. Og nógva tosið um eitt sjálvstøðugt Skotland og fólkaatkvøðu fær oftani politikarar og kjakarar annars at vísa til Føroyar og føroyska sjálvstýrismodellið. Hóast vaksandi tal av skotum ynskja at loysa frá Stórabretlandi, tó at tað enn ikki er meiriluti fyri loysing, so vilja bæði hetlendingar og orknoyingar heldur hava størri sjálvstýri og verða partur av Stórabretlandi enn at vera partur av einum framtíðar sjálvstøðugum Skotlandi. Nú skriva skotsk bløð, at oyggjabólkarnir fyri norðan kunnu vera við til at seta fót fyri ætlanunum hjá Alex Salmon og hansara SNP flokki at gera Skotland leyst av Stórabretlandi. Orsøkin - fólkið í hesum oyggjum ynskir ikki at verða stýrt úr Edinburgh. Nógvir av oyggjabúgvunum síggja framvegis Norra sum teirra andaliga heim og Føroyar sum teirra næstu skyldfólk í Norðuratlantshavi. Sostatt kunnu Orknoyggjar og Hetland verða verandi partur av Stórabretlandi, um restin av Skotlandi atkvøður fyri loysing skrivar Simon Johnson, politiskur blaðstjóri í Skotlandi. Umrøddu niðurstøður stava frá eini frágreiðing, sum tinglimirnir úr oyggjabólkunum í tinginum í London hava skrivað. Oyggjarnar kunnu entá taka loysing sjálvar verður sagt. Alternativið er at góðtaka eitt sjálvstøðugt Skotland men bert um oyggjarnar fáa tillutað ein nógv størri part av olju- og gassinntøkunum úr Norðsjónum. Víst verður á, at umleið ein fjórðingur av oljuni finst í hetlendskum sjógvi. Politiskt dynamitt Liberali tinglimurin fyri Hetland, Tavish Scott váttar, at talan er um politiskt dynamitt, men spyr, hví Alex Salmond tekur patent uppá at brúka oljuríkidømið sum grundarlag fyri loysing. Íbúgvarnir í oyggjunum har norðuri hava vanliga verið sera nógv ímóti skotskum sjálvstýri og velja

Westminster framum at verða stýrd úr Edinburgh. Oyggjarnar vóru partur av Noregi og ikki Skotlandi, til seinast í 15. øld. Skotski sjálvstýrisflokkurin SNP hevur áður viðurkent rættin hjá oyggjunum sjálvar at avgera sína framtíð, men tað var illa dámt, tá ein av ráðharrunum í skotsku stjórnini vísti á, at oyggjarnar kunnu ikki gera slík krøv galdandi, tí tær eru ikki ein tjóð Hetlendingar og orknoyingar vísa á, at nógv av oljuvirkseminum er knýtt at teirra oyggjum, eitt nú teir báðir oljuterminalarnir Sullom Voe og Flotta. Eisini er ein oljugrunnur uppá 6 milliardir krónur knýttur at oyggjunum. Nógvar av stóru olju- og gasskeldunum liggja í teirra sjóøkjum. Oyggjabúgvarnir fyri norðan bera eisini ótta fyri, at fær Skotland størri vald, og meiri vald verður flutt til Edinburgh, so fara teir 42.000 íbúgvararnir í Hetlandi og Orknoyggjunum at hvørva í tí stóru myndini við millionum av fólkum, sum búgva rundan um Glasgow og Edinburgh. Tá tosað verður um støðuna hjá Hetlandi og Orknoyggjunum í framtíðini verður sagt, at ein møguleiki er at geva oyggjunum størri sjálvstýri og lata tær fáa eitt slag av heimastýri og rættin til at krevja inn skatt í eini skipan, sum líkist tí føroysku. Norra og Føroyar fyrimyndir Nógvir oyggjabúgvar síggja framvegis Norra sum sítt andaliga heim og Føroyar sum sítt næsta systkinabarn í Norðuratlantshavi. Seinast tá fólkaatkvøða var í Hetlandi fyri 35 árum síðani og spurt varð, um oyggjabúgvarnir vildu vera ein partur av einum sjálvstøðugum Skotlandi varð úrslitið 9-1 ímóti skotska sjálvstýrinum. Á skotska meginlandinum vilja tey tó als ikki tosa um at sleppa Hetlandi og Orknoyggjunum undan at vera partur av einum framtíðar sjálvstøðugum Skotlandi. Til tess eru oyggjarnar alt ov týdningarmiklar og virðismiklar fyri Skotland. Og soleiðis fer tað eisini at vera fáa vit loysing sigur umboð fyri skotska sjálvstýrisflokkin. Men leggur aftrat, at SNP fer sum altíð at stuðla oyggjunum at fáa størri heimastýri verður talan um at loysa frá Bretlandi.